

## Umstrídd reality-stjørna vitjar

Hon er ein av teimum, sum er kend fyri at vera kend. Susan K var við í sendirøðini Paradise Hotel fyri nøkrum árum síðani, og hon fór so langt í sendingini, at hon gjørdist landskend í Danmark. Síðani hevu rhon útmerkað seg við at verða tann stóra veitslugentan í Danmark, og hon hevur eisini verið í geglinum og vent, eftir at hon gjørdi seg inn á eina kvinnu, sum arbeiddi á einum dansistaðið. Í kvøld og leygarkvøldið vitjar Susan K í Føroyum. Hon verður gestabarrvørður á Mica í Havn.

## John av Reyni í Lítluvík

Í dag, fríggjadagin 23. apríl, letur John av Reyni upp eina framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. John hevur áður sýnt fram í Müllers Pakkhúsi á ólavsøku, men hetta er fyrstu ferð, John hevur framsýning í Smiðjuni. Á framsýningini eru málningar og vatnlitamyndir. Framsýningin letur upp kl. 16 og er opin til kl. 19. Annars er opið leygardagin og sunnudagin frá kl. 13 – 18, og mánadagin frá kl 16 - 19.

## Kom ikki vegin fram

Seinastu nátt varð Norröna enn ikki komin so langt á ferðini til Danmark, og tí vórðu boð send eftir tyrlu úr Føroyum at koma eftir einum manni, sum var vorðin sjúkur.

Lækni var umborð, og hann metti, at maðurin skotast gjørligt mátti koma í land.

Hóast øsku í luftini, fór tyrlan avstað, men tá ið tyrlan kom til lands, var maðurin deyður.

Hetta var ein 71 ára gamal maður, búsitandi í Føroyum. Hann fór við Norrönu sum vanligur ferðamaður.

*randi@sosialurin.fo*

## Kappaði beinið av lambinum

Ein seyðaeigari í Suðuroynni er skuldsettur fyri brot á djóraverndarlógina.

Djóraverndarfelagið fekk eina fráboðan um eitt lamb, sum eitt bein varð tikið av. Felagið fór so at leita eftir lambinum og boðaði so politinum frá.

Lambið hjá seyðaeigaranum var yvirkoyrt, og maðurin hevði kappað eitt bein av lambinum og latið tað gingið í tveir dagar.

So skjótt sum politiið kom upp í málið, varð lambið dr ipið.

# Skúvoyingur ársins sandoyingur

**HEIÐUR** Atkvøðugreiðslan á Sandportal útnevndi greitt Tummas Frank Joensen í Skúvoy at vera ársins sandoyingur, og fyri tað fekk hann í gjár handað eina steinplátu og blómur

Randi Jacobsen

Fyri at gera okkurt positivt fann Terji Dalsgaard, sum hevur Sandportal, uppá at hava eina atkvøðugreiðslu á portalinum við endamálinum at velja ársins sandoying.

Tá ið atkvøðugreiðslan var av, var Tummas Frank Joensen í Skúvoy greitt nummar eitt. Av teimum stívliga 9000 atkvøðunum fekk hann 2544.

Fyrrapartin í gjár skipaði Terji Dalsgaard so fyri, at Tummas Frank Joensen varð heiðraður. Terji Dalsgaard var staddur í Havn, og tá ið Tummas Frank Joensen og konan Elisabeth komu til Havnar, fóru hetta fylgið í løgtingshúsið eftir Gerhardi Lognberg, sum hevði átikið sær at handa Tummasi Frank blómur og steinplátu við áskriftini Ársins sandoyingur.

Gerhard Lognberg var í óvanliga góðum hýri, tí beint frammanundan hevði løgtingið endaliga samtykt at byggja ítróttarhøll á Sandoynni.

Tingmaðurin ynskti Tummas Frank Joensen til lukku við heiðrinum, og hann nevndi mannin eina brandsál, sum hevur arbeitt fyri Skúvoynna og hinar útoyggjarnar.



**HEIÐUR**

***Tummas Frank Joensen og konan Elisabeth vóru ikki sørt fegin, tá ið hann av Gerhardi Lognberg fekk handað steinsúlu og blómur sum ársins føroyingur. Sandportal stóð fyri tiltakinum***

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tummas Frank Joensen takkaði øllum, sum høvdu valt seg. Hann takkaði eisini hinum, sum høvdu stillað upp, og hann helt, at onkur av hinum høvdu minst líka væl sum hann uppiborið at fáa heitið ársins sandoyingur..

Terji Dalsgaard sigur, at ætlanin er aftur næsta ár at útnevna ársins sandoying. Tá skal atkvøðugreiðslan fara øðrvísi fram, við sms-um.

# Tíðin komin til morsniglaveiðu

**URTAGARÐAR** Náttúrugripasavnið mælir fólki til at fara út í urtagarin nú at týna morsniglar

Randi Jacobsen

Nú tað er farið at vára, eru teir fyrstu morsniglarnir byrjaðir at gera um seg, og Náttúrugripasavnið mælir fólki til at fara í hernað móti hesum óbodna gesti. Morsnigilin nørist sera skjótt, og tí er neyðugt at byrja beinanvegin, um tað skal bera til at halda honum niðri. Snigilin ger stóran skaða í urtagørðum, tí hann etur næstan alt, sum fyri er.

Hann er lættur at kenna, tí hann er skínandi og javnt morreyður. Tó kann hann vera ymiskur á liti frá morreyðum til ljósagult, og teir ungu morsniglarnir eru meira gjøgnumskygdir. Snigilin kann gerast upp í 15 cm langur.

### Ymiskir mátar

Umráðandi er at seta fellur upp ella gera onnur tiltøk, so skjótt teir fyrstu smáu ókynsbúnu sniglarnir koma fram. Verða sniglarnir fyrst kynsbúnir, kunnu teir gerast fleiri túsund í tali, sum summarið líður.

Mátarnir eru ymiskir at beina fyri morðsniglum.

Tað ber til at nýta sniglafellu og egna við keks, øli ella súreplaflusi.

Tað fæst eitt sniglaeitur, ið er jarnsulfat [Fe2(SO4)3]. Tað er ikki eitrandi fyri fugl og hópast ikki upp í náttúruni.

Ein annar máti er at henta sniglarnar og leggja teir í kókandi vatn ella stoyta kokandi varn oman fyri teir. Summi brúka at henta upp í plastposar við salti, tí tá doyggja teir eisini beinanvegin.

Eini góð ráð eru at fara í eingangshandskar, tí snigulin er eitrandi.

Har nógvar sniglar eru, kunnu teir vera omaná jørðini um dagin, men serliga nógvir snigla eru at síggja, tá ið tað er slævið og upp undir skýming.

Alt grannalagið má ganga saman um at týna morsnigilin, um tað skal muna. Slíkt felags arbeiði kann harafrat vera við til at styrkja grannalagið.

*randi@sosialurin.fo*

